Bárður Nielsen:

# Vísir ikki uppskotinum hjá Óla Breckmann aftur

**Skulu føroyingar hava møguleika at keypa árliga upp til eitt nú 25.000 kr í partabrøvum við skattafrádrátti? Tað vil Óli Breckmann hava fíggjarmálaráðharran at siga sína hugsan um í Løgtinginum. Miðflokkurin mótmælir uppskotinum staðiliga**

BÚSKAPUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Bárður Nielsen sigur, at uppskot til broytingar í kapitalvinnuskattalógini eru á veg frá hansara síðu, sum innibera, at um fólk hava kapitalútreiðslur av íløgum, skulu tey kunna draga rentútreiðslur frá kapitalvinninginum, men hetta uppskotið er tó ikki líka víttfevnandi sum uppskotið hjá Óla Breckmann*

Um vikuskiftið varð fyrispurningur frá Óla Breckmann til Bárð Nielsen, landsstýrismann, almannakunngjørdur á heimasíðu Fólkafloksins, har løgtingslimurin skjýtur upp, at Landsstýrið við lóg skal tryggja øllum føroyingum, at um teir vilja keypa fyri upp til 25.000 krónur árliga í partabrøvum, so skal bera til hjá teimum at draga hesa upphædd frá í skatti.

Óli Breckmann vísir á, at tann stóri handil, sum seinastu tíðina hevur verið við partafeløgum og partabrøvum, bert er ein viðfáningur móti teimum virðum, sum fara at skifta eigara, um Landsstýrið fer at einskilja almennar fyritøkur fyri millum 4 og 5 milliardir.

Fólkafloksmaðurin ávarar eisini ímóti, at tað almenna fer at býta út ókeypis partabrøv til føroyingar, tí hetta hevði neyvan broytt »tann ráðandi løntatakarahugburðin«, sum Óli Breckmann tekur til.

Sunnukvøldið sendi Miðflokkurin út yvirlýsing, har tinglimir floksins, Jenis av Rana og Bill Justinussen, finnast at uppskotinum. Umframt at vísa á, at teir ikki duga at síggja, hvussu føroyingar kunnu keypa tað, ið miðfloksmenninir sjálvir meta, at føroyingar longu eiga frammanundan, skriva teir soleiðis í yvirlýsingini:

– »Tað mest geniala er tó, at flestu føroyingar, t.d. illa sperdar barnafamiljur, pensionistar, arbeiðsleys og vit kundu hildið á, tey hava neyvan ráð at keypa, fáa tí ongan studning og missa ta ogn, tey í dag eiga. Hini, tey, ið hava peningin kláran, kunnu í friði og náðum leggja inn undir seg aftur tær ognir, sum vanligi føroyingurin bjargaði í kreppuni- og fáa harafturat beinleiðis atgongd í landskassan eftir peningi at gjalda part av hesum keypi við.«

## Roynt í Íslandi

Hesum er Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, ið er maðurin, sum skal svara fyrispurninginum frá Óla Breckmann tó ikki samdur við. Hann er nevniliga sjálvur heitur talsmaður fyri at einskilja almennar fyritøkur.

Í samrøðu við Sosialin sigur landsstýrismaðurin, at uppskotið hjá fólkafloksmanninum sum so ikki er ein nýggjur tanki, tí hatta er tað sama, ið íslendingar gjørdu fyri at eggja fólki til at gera íløgur í partabrøv.

Landsstýrismaðurin vísir tó á, at hann metir ein ávísan mun vera á Íslandi og Føroyum. Íslendingar vóru í síni tíð nevniliga ikki sørt bangnir fyri at spara upp, tí vandi var altíð fyri, at krónan varð niðurskrivað. Í Føroyum hava vit hinvegin altíð havt sum siðvenju at gjalda hús o.a. niður.

## Aðrar broytingar á veg

Men hóast tað er lutfalsliga nýtt at gera slíkar íløgur hjá sokallaðum vanligum føroyingum, so dylir Bárður Nielsen tó ikki fyri, at hetta eisini kundi virkað sum eitt amboð til eisini at eggja føroyingum at gjørt íløgur í partabrøv. Hann vísir á, at nógvir føroyingar longu hava eitt sindur við virðisbrøv at gera, og kemst hetta kanska av, at nógvir handlar eru farnir fram seinastu tíðina, sum eingin hevði droymt, fóru at henda. T.d. eru fleiri gamlar familjufyritøkur seldar og successøgurnar úr t. d. oljuvinnuni eru eisini fleiri.

Bárður Nielsen sigur, at hóast hann metir tankan at vera áhugaverdan, so er hetta ein spurningur, sum hvørki er viðgjørdur í Sambandsflokkinum ella í samgonguni. Tó sigur hann seg sum so einki ímóti uppskotinum, tí hann metir tað vera eitt insitament til at fáa fólk at gera íløgur. Hann sær hetta uppskotið tó ikki sum ein varandi skipan, men heldur sum eina skipan, ið skuldi verið í gildi í eini trý ár.

Bárður Nielsen minnir tó á, at uppskot til broytingar í kapitalvinnuskattalógini eru á veg frá hansara síðu, sum innibera, at um fólk hava kapitalútreiðslur av íløgum, skulu tey kunna draga rentútreiðslur frá kapitalvinninginum, men hetta uppskotið er tó ikki líka víttfevnandi sum uppskotið hjá Óla Breckmann.

Løgtingið kemur saman aftur 31. januar, og sambært tingskipanini skal fyrispurningurin verða svaraður av Bárði Nielsen 14 yrkadagur eftir hetta.

